Álit

í

løgtingsmáli nr. 37/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (Ábyrgdin av dagtilboðum og umlætting til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur verður flutt til kommunurnar)

Eirikur í Jákupsstovu, landsstýrismaður í almanna- og mentamálum, hevur lagt málið fram 4. november 2025, og eftir 1. viðgerð tann 6. november 2025 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. og 13. november 2025.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Kommunufelagið og landsstýrismannin í almanna- og mentamálum, Eirik í Jákupsstovu.

Síðani eldraøkið varð lagt út til kommunurnar at umsita, hevur ofta verið frammi, at fólk undir fólkapensjónsaldur við demenssjúku detta niður ímillum skipanir millum land og kommunur.

Hóast talan er um somu sjúku, er aldurin avgerandi fyri, hvør myndugleiki skal veita tænastuna til viðkomandi.

Landsstýrið og Kommunufelagið hava nú gjørt avtalu um, at øll ábyrgdin av økinum verður flutt til kommunurnar. Tað merkir, at tænasta til øll við demens verður veitt av kommunum.

Talan verður um eina einfaldari skipan til gagns fyri borgaran, og kommunur hava eisini bygt upp eina góða tænastu til fólk við demens.

Kommunufelagið og landsstýrið eru eisini samd um fíggingarleistin, sum liggur í øðrum lógaruppskoti, sum Løgtingið viðger í løtuni.

Trivnaðarnevndin heldur, at við lógarbroytingini verður tænastan til borgaran betri.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd Trivnaðarnevnd undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 18. november 2025

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Jaspur Langgaard
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Kim Durhuus	